**(Uppskot til)**

# Kunngerð

**um**

**semingsmann í ósemjum um upphavsrætt**

Við heimild í § 44, stk. 2 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt, verður ásett:

**§ 1.** Stendst ósemja um upphavsrættargjøld, kann landsstýrismaðurin peika á semingsmann, ið kann royna at loysa ósemjuna, um ikki partarnir eru ímóti tí.
*Stk. 2.* Eru samráðingar um avtalur á upphavsrættarøkinum úrslitaleysar, kunnu partarnir heita á landsstýrismannin, um at fáa semingsmann uppí samráðingarnar.

**§ 2.** Tá semingsmaður skal veljast, kunnu partarnir í ósemjuni tilskila hvør fakkunnleiki, teir meta eru av serligum týdningi í málinum.
*Stk. 2.* Tilmæli um fakkunnleika frá pørtunum eru ikki bindandi fyri landsstýrismannin, tá semingsmaður skal veljast.
*Stk. 3.* Er semingsmaður ógegnigur, kann hann ikki taka lut í semingsarbeiðinum, sbr. § 3 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg.
*Stk. 4.* Tá semingsmaður verður valdur, verður varasemingsmaður valdur samstundis. Varasemingsmaðurin yvirtekur virksemið, um semingsmanninum berst frá.

**§ 3.** Semingsmaðurin ásetir tíð og stað fyri semingsfundi, og boðar pørtunum frá í góðari tíð.
*Stk. 2.* Semingsmaðurin leggur fundin til rættis og virkar sum orðstýrari undir fundinum.
*Stk. 3.* Tað áliggur semingsmanninum at syrgja fyri, at ósemjur verða tiknar til viðgerðar kvikliga, umframt at mál, ið eru tikin í viðgerð, verða avgreidd so kvikliga sum til ber.

**§ 4.** Tá semingsmaðurin fer til verka, lata partarnir honum øll viðkomandi skjøl.
*Stk. 2.* Metir semingsmaðurin at honum tørvar meira tilfar enn partarnir hava latið, heitir hann á partarnar um lata meira tilfar. Hetta tilfar skal verða latið semingsmanninum sum skjótast.
*Stk. 3.* Báðir partar hava atgongd til tilfarið hjá mótpartinum.
*Stk. 4.* Semingsmaðurin kann loyva pørtunum at bera fram sjónarmið síni munnliga bæði áðrenn og undir semingsarbeiðinum.

**§ 5.** Metir semingsmaðurin at skrivliga tilfarið er nøktandi, kann semingsuppskot verða skrivað uttan munnliga samráðing.
*Stk. 2.* Semingsmaðurin kann geva pørtunum eitt semingsuppskot og krevja bindandi svar innan rímiliga freist.
*Stk. 3.* Eru útlitini fyri semju vánalig, kann semingsmaðurin boða pørtunum frá, at semingsarbeiðið av tí orsøk verður steðgað, ella mæla pørtunum til at málið verður viðgjørt í gerðarrætti og luttaka í valinum av gerðardómara.
*Stk. 4.* Semingsmaðurin kann gera av, at galdandi avtalur ikki fara úr gildi, meðan arbeitt verður við semingini. Hesar avtalur fara tó seinast úr gildi 2 vikur eftir at seming er uppgivin, uppskot til seming er samtykt ella málið verður viðgjørt í gerðarrætti.
*Stk. 5.* Semingsmaðurin kunnar landsstýrismannin um arbeiðið, so hvørt sum mál verða loyst, send til gerðarrættin ella sloppin, tí seming ikki fæst í lag.

**§ 6.** Mentamálaráðið virkar sum skrivstova hjá semingsmanninum í upphavsrættarmálum.

**§ 7.** Partarnir, semingsmaðurin og skrivstovan hava tagnarskyldu, um ikki annað er avtalað, sbr. § 27 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg.

**§ 8.** Er annað ikki avtalað, verður kostnaðurin fyri semingina býttur javnt millum partarnar.
*Stk. 2.* Eru fleiri partar á aðrari síðuni, bera teir í samábyrgd teirra partskostnað.
*Stk. 3.* Semingsmaðurin kann treyta sær, at metti kostnaðurin verður latin banka í varðveitslu áðrenn farið verður í holt við semingsroyndina.

**§ 9.** Fundarfrásøgn verður skrivað fyri hvønn fundin. Í fundarfrásøgnini verður greitt frá partanna sjónarmiðum. Hava partarnir umboð við sær, ella lata seg umboða av øðrum, skal hetta vera við í frágreiðingini.

**§ 10.** Kunngerðin kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, XX.XX.2013

Bjørn Kalsø
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Lógarteksturin:**
*Seming*
**§ 44**. Ósemja millum felagsskap, sbr. § 39, stk. 2 ella rættindahavarar, sum ikki eru limir í felagsskapi og brúkara um nýtslu av vardum verkum, og ósemja um viðurlag sambært avtalu við felagsskapin verður loyst við semingsmanni.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur um, hvussu partarnir velja semingsmann og um heimildirnar hjá semingsmanni, harundir at hann kann taka støðu til, um uppskotnar treytir fyri nýtslu av vardum verkum eru rímiligar, og at hann í áheitanini um at vera semingsmaður kann fáa álagt ávísar uppgávur, sum semingin skal fevna um.
*Stk. 3.* Semingsmaðurin ásetir sjálvur støddina av samsýningini fyri seming í hvørjum máli sær. Uttan so at semingsmaðurin avgerð annað, verða útreiðslurnar javnbýttar millum partarnar í málinum, sum bera útreiðslurnar við samábyrgd. Eru fleiri partar, bera allir partar útreiðslurnar við samábyrgd.